## Fimti hvør dani hevur loyniligt nummar

Danir tíma ikki longur at verða órógvaðir at telefonseljarum og øðrum sum gera spurnarkanningar.

Útivið 20% av øllum dønum við fastnet-telefon ynskja ikki at ein skal finna teir í telefonbókini.

Teir hava hinvegin valt at goyma seg sum "lagdur burturúr" ella "udeladt" sum tað eitur á donskum. Her eru hvørki navn ella bústaður at finna, um onkur skuldi roynt at leita eftir teimum.

Morgunblaðið "24timer" hevur spurt seg fyri hjá trimum av størstu telefeløgunum í Danmark – Tele2, Telia og TDC. Allastaðni er gongdin hin sama:

- Tað hava altíð verið nøkur sum vilja goyma seg. Sum oftast er tað konan, sum er farin undan einum harðligum manni.

- Hetta tók av álvara dik á seg, tá vit byrjaðu tænastuna við nummarvísarum. Tað merkti, at fólk sjálvi vildu avgera, hvør sum skuldi síggja teirra telefonnummar, sigur Gert Ritter, stjóri í TDC Privat við blaðið.

Hjá TDC Privat hava 23% av kundunum annaðhvørt dult nummar ella hava valt at krógva samleika sín fyri teimum forvitnu.

# Fá óhapp á smølum vegi

**Sambært hagtølum frá Landsverki koyra í miðal 80 bilar millum Húsavík og Dal um dagin. Fráboðaðu ferðsluóhappini eru tíbetur fá í tali**

FERÐSLA
*Snorri Brend*

**Dalur:** Nógv hevur verið tosað um trygdina hjá teimum, sum hvønn einasta dag mugu úr ella til Dals.

Vegasambandið til grannabygdina og umheimin gongur gjøgnum Dalslíð, og har kemur meiri enn so fyri at grót dettur niður á vegin. Hinvegin so er hetta eitt vandamikið vegastrekki, tí beint er niðurfyri í havið.

Sambært áðurnevnda yvirliti er bert boðað frá einum einstøkum ferðsluóhappi í Dalslíð tey seinastu fimm árini. Hetta hendi í 2004.

Arbeitt verður í løtuni við at fyrireika ein tunnil millum Dal og Húsavík, og gongur hetta arbeiðið framá, hóast onkrar forðingar eru í arbeiðinum. Neyðugt verður tí at finna fram til aðra linjuføring enn ta fyrst ætlaðu.

Kostnaðarmetingin sigur at hesin góðar tveir kilometrar langi tunnilin fer at kosta einar 100 mió. kr.

Ein onnur líð er eisini á Sandoynni, nevniliga Sandslíð, sunnanfyri bygdina Sand. Eftir hesum strekki koyra í miðal 500 bilar um samdøgrið, og her hevur ein skrásett trý ferðsluóhapp seinastu fimm árini.



*Sandslíð er vøkur at koyra eftir, men er ofta merkt av at grót dettur oman á vegin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Nýggjur sløkkiliðsbilur á Sandi

**Hósdagin kom ein nýggjur sløkkiliðsbilur til Sandoynna, sum Sands Kommuna sum hevur keypt frá sløkkiliðnum í Odense**

SLØKKILIÐ
*Snorri Brend*

**Sandur:** Hesin bilurin er frá 1992 og hevur verið partur av tilbúgvingini hjá Odense sløkkiliði.

– Bilurin sær gott út, og er sera væl útgjørdur, sigur Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi.




*Sløkkiliðsbilurin er væl útgjørdur*

Hetta er samstundis fyrsti sløkkiliðsbilurin sum nakrantíð er keyptur til Sandoynna.

Bilurin er liður í ætlanini hjá Sands Kommunu í eini víðari útbygging av sløkkiliðinum. Bilurin kemur tí at verða partur av tilbúgvingini hjá Sands Sløkkiliðið.

Sands Kommuna hevur gjørt avtalu við Finnleif Fagradal um fyribils innivist til bilin.

Kommunan arbeiðir annars í løtuni við eini ætlan um at fáa nýggj hølir til sløkkiliðið, soleiðis at umstøðurnar hjá tilbúgvingini verða so góðar sum møguligt.

Bilurin verður sýndur fram fyri almenninginum á middegi í morgin. Í hesum sambandi hevur Sands Kommuna eina lítla móttøku á kommunuskrivstovuni.